Ársfrágreiðing 2016/2017

# Aðalfundurin 5. apríl 2017

## Ársfrágreiðing 2016/2017

**Starvsnevndin**
Í starvsnevndini sita teir av aðalfundinum valdu limir: Formaðurin/kvinnan og 4 limir.
Starvsnevndarlimir kunnu vera afturvaldir eina ferð.
Starvsnevndin skipar seg á fyrsta fundi eftir ársaðalfundin við næstformanni.

Øll viðkomandi mál verða viðgjørd í starvsnevndini, og hevur starvsnevndin ein fund um mánan, tó undantikið juli og desember.

Á fundi tann 4. mai 2016 skipaði starvsnevndin seg við Jørmund Foldbo sum næstformanni.

Tey, ið hava mannað starvsnevndina síðan seinasta aðalfund eru:
Tóra við Keldu, forkvinna
Jørmund Foldbo, n. formaður
Anna Dahl Olsen
Jákup Danielsen
Gudny Benjaminsdóttir

**Skrivstovan**
Tóra við Keldu hevur verið forkvinna í Meginfelag teirra, ið bera brek í Føroyum síðan seinasta aðalfund. Á skrivstovuni starvast Ása Olsen, sum er aðalskrivari. Jóhanna Hansen skrivstovufólk 15 tímar um vikuna og Gullbjørg Rasmussen er reingerðarfólk.

Arbeiðsuppgávurnar á skrivstovuni eru sera nógvar og víðfevndar.

Nógv av arbeiði hevur verið viðvíkjandi hoyringsarbeiði í samband við lógarsmíð, broyting í lógum og kunngerðum. Fundarvirksemi við limafeløg, stovnar og politiskar myndugleikar.

Nógv fólk venda sær til MBF við fyrispurningum av ymiskum slag. Men so vítt møguligt átekur MBF sær ikki einstaklingamál, uttan so, at tað hevur serligan almennan áhuga. MBF metir eisini, at limafeløgini eru betur før fyri at loysa einstaklingamálini.

ST- sáttmálin, og niðurstøður úr ST verða nýtt sum grundarlag fyri øllum okkara arbeiði.

MBF arbeiðir miðvíst við at minna á niðurstøðurnar úr ST og fyri at ávirka almenna myndugleikan, at arbeiða málvíst við at gera neyðugar broytingar , so at vit kunnu síggja, at arbeitt verður miðvíst út frá sáttmálanum og niðurstøðunum.

MBF hevur havt umboð í einum arbeiðsbólki, ið hevur gjørt uppskot til Tænastupoitikk, ið varð handaður landsstýriskvinnuni í Almannamálum, Eyðgunn Samuelsen 31. januar 2017.

**MBF 35 ár**
Í 2016, vóru 35 ár síðan MBF varð sett á stovn. Í hesum sambandi varð skipað fyri væleydnaðari Ráðstevnu í Norðurlandahúsinum. Áhugavert var at hoyra ymiskar lívssøgur, sang og nakrar av fyrrverandi fokvinnunum siga frá.

Í samband við dagin gav MBF bók út bókina Lukka, ið er ST sáttmálin styttur og tillagaður soleiðis, at hann er lættari at skilja.

**Fíggjarviðurskiftir**
Stuðulin yvir fíggjarlógina fyri 2017 er 1,6 mill. Við støði í lóg um ítróttarvedding fær MBF tillutað 5% av veddingarpengunum. Upphæddin fyri 2016 var 674.000 kr. Vit hava ikki fingið at vitað enn, hvussu stór upphæddin fyri 2017 verður. Hesin peningur kemur bæði MBF og limafeløgunum til góðar.

**Býtislykilin**
Sambært viðtøkunum hjá MBF, skal aðalfundurin taka støðu til býtið av fíggjarliga stuðlinum til limafeløgini, eftir at raksturin hjá MBF er frádrigin.

**ST- sáttmálin**
Niðurstøðurnar frá ST nevndini eru okkara amboð mótvegis politiska myndugleikanum. AMR er farið undir eina tilgongd, har Ráðið fyri brekað eftir ætlan verður umskipað, men hetta arbeiði tekur langa tíð. Gongd er í arbeiðinum við at skipa ein mannarættindastovn í Føroyum, og hevur hetta arbeiði verið í gongd eina tíð.

**Bústaðarviðurskiftir**
Í løtuni er stórur mangul uppá egnaðar bústaðir serliga í Tórshavn. Nógvir bústaðir eru í ringum standi og hava stórar avbjóðingar verið á Eirargarði, har búfólkini eru flutt orsaka av soppi. Landsstýriskvinnan í Almannamálum ætlar at leggja uppskot fyri tingið um at ístandseta Eirargarð. Hetta kemur eftir hennara tykki at geva 32 nýggj búpláss, men er hendan verkætlanin rættiliga ivasom hetta tí at umstøðurnar hjá teimum, ið skulu búgva har ikki verða mettar nóg góðar ella nútíðarhóskandi.

**Arbeiðsmarknaður**
Ása Olsen er stýrislimur í Dugna. Skúlin við Áir bjóðar nú fyrireikingarflokk til 9. flokk og 9. flokk.

Dugni er ein endurbúgvingarstovnur undir Almannamálaráðnum, sum er skipaður sambært viðtøkum frá 1. juli 2012. Endamálið hjá Dugna er millum annað at royna arbeiðsevnini hjá borgarum, ið eru vinnutarnaðir, og at skipa fyri arbeiðsvenjing, endurbúgving og umskúling, so vinnutarnað aftur kunnu fara til arbeiðis.

Visjónin hjá Dugna er, at øll sum fáa pláss á Dugna, skulu koma í útbúgving ella arbeiði.

**Fountainhúsið**
Er skipað sum ein royndarverkætlan, ið bjóðar arbeiðsrættað tilboð til persónar, sum eru sálarsjúkir ella hava sálarligar trupulleikar. Tilboðið hevur koyrt nú í trý ár, og hevur hetta tilboð virkað væl.

**Miðnámsútbúgving, serliga skipað miðnám**
Umframt flokkin á Kambsdali, byrjaðu flokkar av næmingum á Glasi og á Tekniska skúla í Klaksvík.

**Atkoma**
Fyrsti partur av einari vestnorðurlendskari verkætlan innan atkomu til ferðavinnu verður liðug í mai 2017. Í hesum sambandi verður skipað fyri einari ráðstevnu 19. mai í Norðurlandahúsinum, har fyrilestrarhaldarar koma frá flestu norðurlondum.

Hóast Teknmálstulkatænastan hevur fingið hægri játtan at seta skrivitulk, er skipanin við skrivitulki ikki farin rættiliga í gongd enn.

Í samband við, at nýggjur Public Service sáttmáli er gjørdur, fekk MBF tann partin av sáttmálanum, ið viðvíkur teknmálstulking og skrivitulking til hoyringar. MBF fekk sínar viðmerkingar við í nýggja sáttmálan, og vóna vit at hetta kemur at síggjast við at sendingar verða teknmálstulkaðar og tekstaðar.

Í løtuni situr ein arbeiðsbólkur og ger eina verkætlan um hvussu øki hjá deyvum og tunghoyrdum kann skipast framyvir.

MBF hevur havt nógv arbeiði orsaka av atkomuviðurskiftum til bygningar. Tá kommunur geva fólkum boð um at halda byggikunngerðina, søkja tey í nøkrum førum HIMR um undantaksloyvi. Um HIMR noktar at geva teimum undantaksloyvi, venda nøkur av teimum sær til MBF fyri at vita, um MBF kann viðmæla, at tey fáa undantaksloyvi. Hetta er serliga fyri gamlar bygningar, har ein leggur virksemi um til kafé ella matstovu. Formaðurin í kirkjuráðnum fyri Havnar kirkju hevur vent sær til MBF fyri at fáa hjálp, hetta tí at ein ynskir at gera ymiskar broytingar, so at tað er lættari hjá koyristólum at sleppa inn í kirkjuna.

**Fylgjara kort**
Síðan skipanin varð sett í verk, hava 268 fólk, ið bera brek fingið fylgjarakort.
Vit hava ikki frætt um annað enn at skipanin virkar væl allastaðni.

**HNR og Rådet för Nordisk samarbejde**
MBF er limur í HNR. HNR er Norðurlendskt felag fyri meginfeløgini í Norðurlondum og sjálvstýrandi økjunum. Ráðið hevur tveir fundir um árið, ein um várið og ein um heystið. Í 2017 og 2018 hevur MBF formansskapin, og eru tað vit ið skipa fyri HNR fundunum hesi tvey árini. Tey, ið sita sum umboð fyri tey Norðurlendsku meginfeløgini eru formenn/kvinnur og aðalskrivarar í meginfeløgunum.

**Rådet för Nordiskt samarbejde** hevur verið virkið síðan 2013. Tóra við Keldu, forkvinna umboðar MBF í ráðnum, og Ása Olsen, aðalskrivari er tiltakslimur í ráðnum.

**Lógararbeiði**
MBF fær nógv lógaruppskot til hoyringar. Vit halda fram at skipað lógararbeiðið soleiðis, at allar lógir og kunngerðir, sum MBF fær til hoyringar, verða sendar út til øll limafeløgini. Feløgini hava møguleika at gera sínar viðmerkingar. Í flestu førum eru tað ongi ella bert einstøk feløg, ið hava sent okkum nakrar viðmerkingar. Limafeløgini hava somuleiðis møguleika fyri sjálvi at senda sínar viðmerkingar beinleiðis til myndugleikan, sum varðar av lógaruppskotinum, og hendan møguleika eru tað nøkur limafeløg, sum brúka. Annars sendir MBF hoyringssvar til øll lógaruppskot, sum koma til felagið.

Í samband við lógararbeiði, møta umboð fyri MBF í ymisku Løgtingsnevndunum ið varða av lógaruppskotinum.

**Formansfundir**
Í samband við, at 35 ára dagurin fyri at MBF varð sett á stovn var sjálvan ST dagin 24. Oktober, varð skipað fyri einum øðrvísi formansfundi á Hotel Hafnia. Á formansfundinum høvdu Eydna Skaale og Tóra við Keldu, forkvinna framløgu.

10. november var aftur formansfundur í MBF húsinum, har Tóra við Keldu, forkvinna hevði eina framløgu um aktiónslæring. Síðan vóru allir formenninir býttir upp í bólkar, har teir fingu møguleika fyri at tosa saman og avprøva aktiónslæring.

22. februar var aftur formansfundur, har orðið brek var á skránni. Somuleiðis varð hildið fram við at formenn sótu saman í bólkum, somuleiðis var framløga um formans og nevndararbeiði.

Hesir fundir eru ein liður í tí at menna limafeløgini soleiðis, at tey kunnu brúka hvønn annan og læra av hvørjum øðrum. Somuleiðis verður skipað fyri framløgum/skeið, ið formenn hava ynskt.

**Onnur tiltøk**
Í ár varð bókin Lukka givin út í samband við ráðstevnuna í Norðurlandahúsinum. Bókin hevur fingið góða undirtøku, og hevur onkur skúli gjørt av at nýta bókina í undirvísingini. Allir 4. flokkar fingu bókina.

Lukka liggur nú á heimasíðuni hjá MBF sum vanlig bók, ljóðbók og teknmálstulkað.

Tann 3. desember skipaði MBF fyri tiltaki í Norðurlandahúsinum saman við Ráðnum fyri Brekað og AMR.

13. mars og 15. mars skipaði MBF fyri pallborðsfundi í Klaksvík og Runavík. Heitið á pallborðsfundunum var “ Ber orðið brek”?

Fundirnir eydnaðist væl, og tóku fleiri av áhoyrarunum orðið.

**MBF blaðið**
Í 2016 kom eitt blað út.
Blaðið snúði seg um Fólkaskúlan og ráðstevnuna í Norðurlandahúsinum.

Tað er Rit & Ráð við Torfinn Smith, sum skrivar flestu greinarnar, og sum annars tekur sær av øllum viðvíkjandi útgávuni. Blaðið verður sent út til allar viðkomandi almennar og privatar stovnar og myndugleikar umframt til fólk, ið hava ynskt at fáa blaðið.

**Heimasíðan**
MBF hevur eina virkna heimasíðu, sum vit meta er sera umráðandi. MBF hevur eisini eina virkna síðu á Facebook.

**Húsið**
Í 2016 vóru gjørdar brævsprekkur til øll hølini í MBF hetta so at posturin verður lagdur í hesar í staðin fyri at liggja í gongini.

**Umboðan í Ráðum og nevndum**

**Ráðið fyri brekað**
Formaðurin í MBF er føddur limur í ráðnum. Sum umboð fyri MBF situr harumframt Ruth Thomsen frá Blindafelagnum.

**Ljóðbøkur**
Margreta Næs hevur sitið sum MBF umboð í nógv ár, men er hon farin frá vegna aldur. Orsaka av at arbeitt verður við at umskipað stýrið er ongin limur í stýrinum frá MBF í løtuni.

**Ráðið fyri ferðslutrygd.**
Herit Joensen, Vestmanna, situr sum MBF umboð og hevur hon verið umboð í ráðnum í nógv ár.

**Serflutningsskipanin.**
Ása Olsen, aðalskrivari í MBF, situr sum MBF umboð og skrivari í stýrinum fyri Serflutningsskipanina.

**Psykiatriska sjúklingakærunevndin.**
Fyri MBF situr Sámal Lindenskov, sálarsjúkrarøktari og leiðari á sambýlinum í Eysturstræti, og sum varalimur situr Súna Mørk, limur í nevndini í Sinnisbata.